**Nr. 57/2019**

**Ruth Vang**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um teksting av føroyskum sjónvarpssendingum, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Ætlar landsstýrismaðurin at gera nakað við málið, soleiðis at allar føroyskar sjónvarpssendingar, sum verða sendar í KVF, verða tekstaðar?

2. Um ja, nær kann væntast, at allar føroyskar sjónvarpssendingar verða tekstaðar?

**Viðmerkingar:**
Síðani løgtingssamtyktina frá mai 2009, hevur ST-sáttmálin um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, verið galdandi í Føroyum, og hevur Løgtingið við samtyktini bundið seg til at fremja batar fyri fólk við breki. Landsstýrið letur ST frágreiðing 4. hvørt ár, sum lýsir og metir um, í hvønn mun ST sáttmálar verða uppfyltir. Í 2014 varð sokallað skuggafrágreiðing gjørd, har MBF gjørdi viðmerkingar til frágreiðingina hjá landsstýrinum um støðuna viðvíkjandi sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Niðurstøðan var, at batar vóru neyðugir. Millum annað var neyðugt at betra um møguleikar hjá tunghoyrdum og deyvum til almenna kunning, so tey ikki verða útihýst frá at fylgja við tí, sum hendir í okkara samfelag. ST-nevndin álegði landsstýrinum at tryggja bæði deyvum fólki og teimum, ið hava ringa hoyrn, atgongd til allar sendingar, ið KVF sendir.

Umleið sætti hvør føroyingur hevur eitt hoyribrek, sum m.a. ger tað trupult ella ómøguligt at fylgja við í føroyskum sjónvarpssendingum, sum ikki eru tekstaðar. Hesum 8000 føroyingum er álagt at rinda kringvarpsgjald eins og øðrum.

Nakað er hent á økinum seinnu árini, tá tað kemur til teknmálstulking, og eisini verða flest allar føroyskar dokumentarsendingar tekstaðar, men enn er tó ikki komið á mál. KVF hevur boðað HOYR, felagnum fyri hoyribrekað, frá, at neyðugt er við játtan til 1,5 starv afturat, um allar sendingar skulu tekstast. Tað merkir eitt nú, at seinna sendingin av Degi og viku á kvøldi kann sendast tekstað.

Nú 3. mars, ið er altjóða hoyridagur, nærkast, fari eg at nýta høvi at spyrja landsstýrismannin um teksting av føroyskum sjónvarpssendingum í KVF.

**Á Løgtingi, 24. februar 2020**

Ruth Vang